gult30 cyan30 magenta30 svart30



# Veddað fyri 55 miliónir síðani 1997!

**Aðalfundur í Ítróttarvedding var hildin fríggjadagin í farnu viku, og á skránni var millum annað útlutan av sonevndu veddingarpengunum**

ÍTRÓTTAVEDDING
*tíðindaskriv*

Frá 1997 til og við í fjør spældu føroyingar lotto hjá Tipstænastuni fyri 55 miljónir. Umframt allar vinningarnar, sum eru komnir aftur til Føroya, hevur Tipstænastan tvey tey seinastu árini endurgoldið 16,3 miljónir til Ítróttarvedding, sum hevur býtt peningin millum ÍSF, FUR og Mentamálastýrið. Føroyingar vunnu annars fyri slakar 9 miljónir í lottospølum í fjør.

Aðalfundur var í pf. Ítróttarvedding fríggjakvøldið í farnu viku, har m.a. Tipstænastan handaði yvirskotið av veddingini.

Um Ítróttarvedding er stutt at siga, at stjórnin er myndað av Heðini Mortensen, ÍSF-forseta, í nevndini sita Torfinn Højgaard, formaður, Sigmund Poulsen, næstformaður, Hans Petur Joensen, Søren Pram Sørensen, Heðin Mortensen, Jens Dam Vang og Petur Elias Petersen, sum eru nýggjur nevndarlimur ístaðinfyri Ólav Jákup Kristoffersen.

Einasta onnur broyting í sambandi við skipanini av felagnum var, at 4-ára skeiðið hjá nevndini nú er broytt, soleiðis at nevndin situr í 2 ár í senn.

## Stór undirtøka

Undirtøkan fyri at vedda í Føroyum er ómetaliga stór og vaksandi. Frá 1997 til og við í fjør veddaðu føroyingar fyri 55 miljónir krónur. Tølini eru hesi:

| | |
|---|---|
| 1997 | 12,2 mió |
| 3994 | 13,1 mió |
| 5991 | 13,9 mió |
| 7988 | 15,9 mió |

Í hesum fýra ára skeiði hevur Ítróttarvedding tilsamans fingið 16,3 miljónir, 9,8 miljónir í 1999 og 6,5 miljónir í fjør.

Ført varð fram á aðalfundinum, at hesin peningur hevur givið føroyskum ítrótti eitt álvarsligt skump frameftir, og eggjað feløgum og einstaklingum til at fara í gongd við ymiskt, sum ikki kundi lata seg gera, uttan henda stuðul. Nevnt varð t.d. arbeiðið við fótbóltslandsliðnum, stuðul til Føroya Ungdómsráð og stuðulin til Mentamálastýrið.

## Nýggjur sáttmáli

Sáttmálin, sum Ítróttarvedding hevur við Tipstænastuna, fer úr gildi nú komandi 1. január. Men Ítróttarvedding eru longu fari at fundast við Tipstænastuna um nýggjan sáttmála. Fyrsti fundur var nú 2. apríl í Keypmannahavn. Ætlanin er so, at umboð fyri Tipstænastuna koma til Føroya í juni, har sáttmálin so vónandi endaliga verður avgreiddur.



*Nevndin í Ítróttarvedding: Aftast frá vinstru: Ólavur Jákup Kristoffersen, ráðgevi og sakførari, Jan Dam Vang, nevndarlimur, Hans Petur Joensen, nevndarlimur, Søren Pram Sørensen, nevndarlimur, og Petur Elias Petersen, nevndarlimur. Frema røð frá vinstru. Sigmund Poulsen, næstformaður, Torfinn Højgaard, formaður, og Heðin Mortensen, stjóri.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Fyri at vera væl fyrireikaðir til endaligu samráðingarnar við Tipstænastuna, hevur Ítróttarvedding gjørt eitt kanningararbeiði, hvussu veddingin kann marknaðarførast betur í Føroyum, og umsetningurin og harav avkastið kann økjast uppaftur meira. Ítróttarvedding hevur lagt eitt uppskot fyri Tipstænastuna, og ætlar sær um neyðugt at rinda ein part av hesi marknaðarføring.

Tipstænastan hevur í longri tíð strongt á at fáa sett eitt "skava og vinn"-spæl í gongd í Føroyum. Hetta var frammi á seinasta aðalfundi, og Ólavur Jákup Kristoffersen hevur kannað lógargrundarlagið. Niðurstøðan er tann, at landsstýrið má geva endaliga loyvið, men fyrispurningur eru áður settur landsstýrinum um tílíkt spæl, uttan at vilji var til at geva slíkt loyvi.

Av avkastinum fyri í fjør eru 6 miljónir útgoldnar. ÍSF hevur fingið 3,6 miljónir, FUR hevur fingið 1,2 miljón, og Mentamálastýrið, ið betir peningin út eftir ávísari reglugerð, hevur fingið 1,2 miljón.

# Møgulig víðkan av deildini

**Møguliga verður uppskot lagt fyri aðalfundin hjá HSF, um at víðka talið av liðum í bestu kvinnudeildini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Í kjalarvørinum á trætuni millum Tjaldur og HSF um, hvussu stigatalvan fyri bestu kvinnudeildina eigur at gerast upp, er nú møguleiki fyri, at eitt uppskot til aðalfundin hjá HSF kann loysa málið, soleiðis at bæði Tjaldur og Sóljan fáa umboðan í bestu kvinnudeildini komandi kappingarár.

Hetta letur seg gera, um kappingin í bestu kvinnudeildini verður umskipað, soleiðis at hon framyvir kemur at fevna um átta lið ístaðin fyri sjey. Í fjør varð eitt líknandi uppskot sett HSF eftir aðalfundin, men hetta uppskot fall ta ferðina.

Freistin fyri innlatan av uppskotum til aðalfundin rann út mikukvøldið. T.v.s eftir evstamark okkara, og tá vit seint týskvøldið tosaðu við umboð fyri HSF, var einki uppskot um víðkan av deildini komið til aðalfundin.

Vit hava tó skilt frá aðrari síðu, at eitt tílíkt uppskot er ávegis, og verður hetta samtykt, tykist verandi trætumálið loyst.

## Kann gjøgnumførast

Uttan at kenna nakað til sjálvt innihaldið í uppðskotinum, so tykist ikki vera nøkur beinleiðis forðing fyri, at hetta letur seg gjøgnumføra. Við verandi skipan, sum telur sjey lið, er tað nevnliga soleiðis, at hvørt umfar situr eitt av liðunum yvir. Tískil merkir ein víðkan av deildini ikki ein øking í talinum av leikdøgum, og kann kappingin tískil framhaldandi avgreiðast yvir sama tíðarskeið.

Tey, sum eru ímóti uppskotinum, vilja helst føra fram, at um talið av liðum verður víðkað í átta lið, verður eingin verulig niðurflyting at spæla um. Hetta tí einki av liðunum í næstbestu deildini kann flyta upp. Í løtuni er hetta eisini rætt, men nógv bendir á, at vit um ikki so langa tíð koma at hava fleiri kvinnulið.

TB tykist veruliga at hava fingið gongd á hondbóltinum hjá yngru gentunum, og hesar fara helst skjótt at gera um seg í vaksnamannadeildini. Hartil kemur, at bæði á Eiði og í Kollafirði verða ítróttahøllir bygdar í løtuni, og hetta talar so avgjørt til fyrimuns fyri hondbóltin á hesum økjum.

Enn er helst ov tíðliga at siga nakað um, hvørt eitt tílíkt uppskot hevði vunnið frama á aðalfundinum, men tað kundi so verið ein loysn á málinum, sum nú hevur tikið seg upp.

# KÍ-kvinnurnar fingið europeiskan møguleika

**Nýggj europeisk fótbóltskapping fyri kvinnulið byrjar í heyst. KÍ skal nú svara, um kvinnuliðið hjá teimum ætlar sær við í kappingina**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Europeiska fótbóltssambandið, UEFA, fer nú at skipa fyri eini meistarakapping fyri kvinnulið.

Kappingin byrjar í heyst, og meistaraliðið, KÍ, hevur nú fingið tilboð um at fara við í kappingina.

Í farnu viku sendi Fótbóltssamband Føroya upplýsingar um kappingina til KÍ, sum nú skal taka støðu til, um felagið ætlar at senda kvinnuliðið út í Europa at spæla.

– Vit hava onga avgerð tikið um hetta enn. Vit fáa ongar pengar frá UEFA fyri at luttaka í hesi kapping, og tí fer tað at kosta okkum nógvar pengar, um vit skulu melda liðið til kappingina, sigur Svend Jacobsen, formaður í KÍ.

## Spæla móti fleiri feløgum

UEFA hevur farnu mánaðirnar roynt at fingið limalondini at tekna lið til kappingina, og higartil hava 29 lond boðað frá luttøku. Fýra lond hava sagt nei takk, meðan Føroyar og 17 onnur lond ikki hava givið endaligt svar enn.

UEFA kallar nýggju kappingina European Women´s Club Championship, og kappingin verður skipað við smáum kappingum, har eini trý ella fýra feløg eru við. Í so máta fer hendan kappingin at líkjast kappingunum hjá ungdómslandsliðunum.

Tey feløgini, sum standa seg best, koma víðari í kappingini og enda so í hálvfinalum og finalum um europeiska meistaraskapin.

Fyrstu dystirnir í kappingin verða í semptember mánaði, men um fleiri enn 32 feløg fara at luttaka, verður eitt innleiðandi umfar í juli mánaði.

## Kapping í Klaksvík

KÍ-formaðurin heldur, at tað kundi verið stuttligt at hýst slíkari kapping í Klaksvík.

– Tað hevði verið ein ítróttarlig avbjóðing og ein fíggjarligur fyrimunur at havt eina av hesum minikappingunum í Klaksvík, men vøllurin skal skiftast í summar, og tí letur tað seg neyvan gera, sigur Svend Jacobsen.

Starvsnevndin hjá KÍ viðger í løtuni tilmeldingina til europeisku kvinnukappingina, og fíggjarligu umstøðurnar hava týdning. KÍ skal sum er sjálvt gjalda fyri luttøkuna, og at senda eitt lið uttanlands kann skjótt kosta fleiri hundrað túsund krónur.

Fótbóltssamband Føroya kann lata næstfremsta felagið í landskappingini ella finalist í steypafinaluni sleppa við í kappingina hjá UEFA, um KÍ ikki tekur av tilboðnum.

## B68 til Belgia

Við triðja plássinum í landskappingini í fjør vann B68 sær rætt til at taka lut í Inter-Toto kappingini hetta kappingarárið.

Lutakast hevur nú verið um, hvussu liðini í hesi kappingini hittast, og greitt er, at B68 skal dystast móti einum belgiskum liði. Hvat lið talan er um, er ikki greitt enn, men greitt er, at fyrri dysturin verður á Toftum. Hesin skal spælast antin 16. ella 17. juni.

**jm**

gult31 cyan31 magenta31 svart31



# Flogbóltsgalla

**Eins og hinar stóru ítróttagreinarnar, hevur flogbólturin nú eisini fingið sítt gallakvøld**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir at eitt sera spennandi kappingarár fyri stuttum varð lagt aftur um bak, skuldu ymsu flogbóltsleikararnir í landinum rundað hetta av við einum stórum felagskvøldi.

Hetta varð gjørt leygarkvøldið í HB-húsinum, har Flogbóltssambandið hevði skipað fyri stórfingnum gallakvøldið, sum varð fyriskipað eftir fleiri áheitanum ymsa staðni frá. Hesi gallakvøldini vóru eitt ókent fyribrigdi til fyri heilt stuttum, men eftir at hondbólturin tók táttin upp fyri tveimum árum síðani, tykist hetta rættiliga at hava vunnið fastatøkur á ítróttafólkunum.

Sostatt varð triða gallakvøldið hjá hondbóltinum hildið mikukvøldið, eins og fótbólturin nú tvey ár á rað hevur havt sítt gallakvøld at rundað kappingarárið av við.

## Høvi at hittast

Tað eru sjálvandi fleiri orsøkir til, at hesi kvøldini hjá ítróttafólkunum eru vorðin somikið væl umtókt. Størsta orsøkin er helst, at hetta gevur leikarum og venjarum møguleika at hittast undir heilt øðrum umstøðum, enn tey vanliga gera. Á leikvøllunum kunnu orðini mangan vera beisk, eins og lagið ikki er hitt sama, tá talan ávíkavist hevur verið um sigur ella tap.

Á gallakvøldinum ber líka sum til at leggja alt hetta aftur um bak. Kanska onkur iðrar seg um ávísar hendingar, men orðadrátturin í hesum verður heldur friðarligari og kanska meira hugfarandi, enn hann er undir dystunum.

## Ársins

Hæddarpunktið undir sjálvum borðhaldinum hjá flogbóltsleikarunum var sjálvandi, tá ársins leikarar av ymsum slag skuldu avdúkast. Hesir vórðu framman undan funnir við atkvøðugreiðslu, og úrslitið av hesari varð so kunngjørt leygarkvøldið.

Ein fyri og annar eftir fóru leikararnir so upp á pallin, har tey kundu fegnast um steypið, og ivaleyst gjørdist kvøldið eyka hugnaligt fyri tey, eftir at hava móttikið slíkan heiður. Hugnaligt mundi tað tó vera fyri øll tey, sum vóru hjástødd, og lítið er tí at ivast í, at eisini hjá flogbóltinum verður talan um eitt kvøld, sum verður afturvendandi á hvørjum ári.

Steypini, sum vórðu latin á gallakvøldinum, vóru latin frá Føroya Sparikassa, Norðoya Sparikassa og Tryggingarfelagnum Føroyar. Myndirnar á síðuni hava vit lænt frá SVF.

## Ársins áleypari

**kvinnur**
1 Marina Popovic, Dráttur
2 Tove Riksfjord, Mjølnir
3 Helga Nordendal, Dráttur

**Menn**
1 Boban Ilic, ÍF
2 Rúni Weihe, Fram
3 Borco Ilic, Mjølnir

## Ársins blokaduleikari

**kvinnur**
1 Tina Jacobsen, Mjølnir
2 Helga Nordendal, Dráttur
3 Selma, TB

**Menn**
1 Trygvi Poulsen, Mjølnir
2 Steinar Eirikstoft, Fleyr
3 Boban Ilic, ÍF

## Ársins móttøkuleikari/verjuleikari

**Kvinnur**
1 Margit Joensen, Mjølnir
2 Harriet Hammer, TB
3 Randi Larsen, ÍF

**Menn**
1 Rúni Weihe, Fram
2 Klæmint Isaksen, Fleyr
3 Bartal Eliasen, ÍF

## Ársins hevari

**Kvinnur**
1 Marjun Kalsø. Mjølnir
2 Mariann Øster, Fleyr
3 Ann-Mia Johansen, TB

**Menn**
1 Odd Eliasen, ÍF
2 Pasco Romica, Fram
3 Jákup V. Sivertsen, Fleyr

## Ársins stjørnuskot

**Kvinnur**
1 Sólgerð Henriksen, Dráttur
2 Sóley Philbrow, ÍF
3 Joan Sørensen, Fossánes

**Menn**
1 Suni Juul Petersen, Fram
2 Andrass Jógvansson, Fleyr
3 Steinar Eirikstoft, Fleyr

## Ársins leikari

**Kvinnur**
1 Helga Nordendal, Dráttur
2 Marjun Kalsø, Mjølnir
3 Margit Joensen, Mjølnir

**Menn**
1 Boban Ilic, ÍF
2 Rúni Weihe, Fram
3 Kenneth Neshamar, ÍF



*Øll hesi vórðu kosin ársins av onkrum slag, og fagnaðurin var stórur, tá tey hvør í sínum lagi fóru upp eftir steypunum, sum vóru sjónliga tekini um heiðurin*



*Samanlagt má talan her sigast at vera um besta blokkin í Føroyum. Tina Jacobsen og Trygvi Poulsen vunnu hendan heiðurin*



*Ársins leikari hjá kvinnum gjørdist Helga Nordendal, sum her sæst standa við steypinum*



*Leikandi venjarin hjá Drátti, Marina Popovic, átti týdningarmikla leiklut í fyrsta FM-heitið felagsins, og aftur fyri varð hon kosin at vera ársins áleypari hjá kvinnum*



*Bestu hevararnir í landinum eru sambært atkvøðugreiðsluni Marjun Kalsø og Odd Eliasen*